Lýsingartorgið

Lýsingatreytir fyri ókeypis lýsingar:
✓ privatar lýsingar
✓ í mesta lagi 40 orð
✓ bert ein lutur í hvørjari lýsing
✓ hægsta søluvirði 20.000 kr

Lýsingar, gjaldast skal fyri:
Vanl. lýsingaprísur:
✓ frá fyritøkum og virkjum
✓ fleiri enn 40 orð
✓ søluvirði oman fyri 20.000 kr

tó minst 50,- kr. + MVG hvørja ferð:
Lýsingar, gjaldast skal fyri:
50,- kr. + MVG hvørja ferð:
✓ lýsingar undir teigunum: »Dansur«, »Fundir« og »Matur«
✓ Bill. merktar

Akfør

BILUR TIL SØLU
Nissan Sunny 1.6 stationcar, árg. 87, bíliga til sølu. Treingir til ábøtur.
Tlf. 421061 ella 281725

BMW 320i
Nýlakeraður, senkaður, sýnaður 3/2000, góðkendur uttan kross.
Tlf. 281714

BMW 525 TDS
árg. 92, aut. gear, servo, sóltak, sentrallás, fartpilot og alu. felgur. Bilurin er svartmetall og í sera góðum standi. Til sølu fyri 134.800 kr.
Tlf. 217566 & 217567

CITROEN
BX Turbo diesel, árg. 88, el-rútar, centrallás, alu felgur, pikadekk á felgum, sleipikrók. 22.000,-
Tlf. 319060

CITROEN AX GT
hvítur árg. 1988, hevur el-rútar, sóltak, sportfelgur, sentrallás og tokulyktir. Bilurin er í góðum standi.
Tlf. 313596 ella 221626

CITROËN BX19
TRS, árg. 87, til sølu.
Tlf. 314213 ella 315622

DAIHATSU CHARMANT TIL SØL
Ein Daihatsu Charmant 1600 frá 86, í góðum standi, til sølu fyri 8000 kr.
Tlf. 281724 ella 441596

DEKK/FELGUR
4 stk. 13-felgur til Ford Escort við brúktum heilársdekkum til sølu fyri kr. 1.000,-.
Tlf. 219161

DIESEL BILUR TIL SØLU
Fiat Fiorino Van 1.7 diesel, árg. 93, koyrt 120.000 km. Var í Týsklandi til 97. Brennur sera lítið og er í góðum standi. Prísur 35.000 kr.
Tlf. 310286

FORD ESCORT
1.3 árg. des. 87 til sølu, sýnaður apríl 2000. Bilurin hevur minni motorbrek. Prísuppskot 7.000 kr.
Tlf. 455736

FORD FIESTA
árg. 86/87, til sølu fyri 10.000 kr. Er sýnaður í mai 2000. Hevur koyrt 95.000 km.
Tlf. 313094

FORD MONDEO
1.8 l, aut.gear, árg. 94, bert koyrt 43.000 km í sera góðum standi til sølu.
Tlf. 319800 eftir kl. 18

FORD ORION
Ein Ford Orion til sølu fyri einans 15.000 kr. Sær gott út og er nýsýnaður.
Tlf. 423080

FORD SIERRA
árg. 87, bíliga til sølu. Sær gott út, hevur sóltak, sportsfelgur, cd-spælara og aðra eykaútgerð. Pikadekk á felgum fylgja við. Bilurin stendur hjá D. Brockie bilasølu.
Tlf. 374012

FORD SIERRA 2.3
diesel, árg. 85 til sølu fyri 5.000 kr. sýnaður í apríl 99, defektan gearkassa.
Tlf. 422462 ella 212462 eftir kl. 19

GOODYEAR DEKK TIL SØLU
185/60-14 Goodyear Eagle Touring dekk til sølu fyri kr. 1.800. Hava koyrt 9000 km.
Tlf. 221405

HONDA
Civic Vetec 15 ILS árg. 7/98 til sølu.
Tlf. 424301 ella 214301

INSTRUMENTBRETTI
Hevur nakar eitt instrumentbretti til ein Volvo Penta MD 2001/2002/2003 at selja mær?
Tlf. 314328

MAZDA 323
árg. 84 í hampuligum standi, við ongum plátum, hevur koyrt 137.500 km ber væl til at gera aftur. Til sølu fyri 2000 kr.
Tlf. 220813 ella 316883 eftir kl. 18

MERCEDES 280 SE
til sølu. 180 HK, nýsýnaður, sær gott út bæði uttan og innan, er í sera góðum standi tekniskt, hevur góð dekk, eyka felgur + motor til eykalutir.
Tlf. 447558 ella 217558

MITSUBISHI PAJERO
árg. 86 í góðum standi til sølu.
Tlf. 283058
ella 443058

NISSAN PATROL
Reyður Nissan Patrol, styttra modellið, til sølu. Árg. 86, sýnaður í ár. Koyrt 270.000 km, sær gott út.
Tlf. 315439, e. kl. 17

NISSAN SUNNY 1500
árg. 85, bíliga til sølu. Koyrir, men best egnaður sum eykalutir.
Tlf. 214662 ella 424662

OPEL VECTRA 1.6
GL, árg. 89 til sølu fyri 12.000 kr. Skal gerast í stand fyri ca. 6000 kr. fyri at koma gjøgnum sýn. Hevur ikki nummar plátur.
Tlf. 310060

PEUGEOT 100 1,6i
til sølu um hóskandi boð fæst. Ein økonomiskur bilur, sum orkar væl. Hevur el-rútar, el-spegl, hita í setrunum, fjarstýrt sentrallás og alu. felgur.
Tlf. 219595, e. kl. 18

TIL SØLU
Peugeot 306 1.9 turbo diesel, árg. 4/96 í góðum standi til sølu.
Tlf. 213577 eftir kl. 17

TIL SØLU
165/60-13 felgur við brúktum heilársdekkum til sølu fyri kr. 1.400. Passa til Ford Escort.
Tlf. 221405

TIL SØLU
Vælhildin, heimagjørdur anhangari til Ford Fiesta til sølu. hevur nr-plátur.
Tlf. 315713

TIL SØLU
Eykalutir til Toyota Corolla EE90, árg. 88-92, t.d. hurðar, komplett inntrekk og aut. gearkassi.
Tlf. 456277

TIL SØLU
Nissan Bluebird 1.8 turbo, modell U.11.
Tlf. 371532, e. kl. 18

TIL SØLU
Deilir til Ford Orion og Nissan Bluebird. Dynamo, kølara, startara, lyktir og annað til sølu. Alt fyri 450 kr.
Tlf. 312880

TIL SØLU
Opel Vectra, diesel 4 ár.
Tlf. 448628 eftir kl. 18

TIL SØLU
Honda Accord 2.0 exi árg. 88 bíliga til sølu.
Tlf. 211208 ella 441208 eftir kl. 17

TOYOTA CAMRY 2.0
GLI til sølu. Bilurin hevur el-rútar, powerstýring, centrallás og velour inntrekk.
Tlf. 219005 ella 217192

TOYOTA CAMRY 2.0 GLi
frá '86 til sølu. Bilurin hevur el-rútar, powerstýring, central-lás, digital instrumentbretti og velour inntrekk. Prísur 20.000 kr.
Ring 219005 ella 217192

TOYOTA CARINA 1.6
bensin, árg. 6/87, sýnaður 9/99, havt tríggjar eigarar, til sølu fyri 15.000 kr.
Tlf. 315246 Helena

TOYOTA CARINA E
2.0 GLI, aut. gear, í sera góðum standi, til sølu fyri 85.000 kr.
Tlf. 449245

TOYOTA COROLLA
árg. des. 85, til sølu. Lægsta boð 14.000 kr. Nógvir slitlutir eru nýliga skiftir. Bilurin er í góðum standi og er sýnaður í juni 2000.
Tlf. 216162 ella 315425

TOYOTA COROLLA 1.6
liftback, árg. 87, koyrt 138.000 km, nýsýnaður juli 2000, prísur kr. 16.000,-
Tlf. 310667

VARIANT VIÐFESTIS-VOGNUR
Føroya mest seldi vognur vegna góðsku og snið! Breitt úrval á goymslu í øltuni! Vognar til allar uppgávur!
Kaj Andreasen & Co
Tlf. 315600
VOLVO 240
DL, árg. 85, bíliga til sølu.
Tlf. 220864 ella 444844

VOLVO 240
diesel til sølu. Hevur nýggjan diesel motor, garanti fylgir við. Sýnaður í mai 1999 og hevur el-spegl og rútar, hevur hita í setrinum. Bilurin er í góðum standi.
Tlf. 220528

VW JETTA
bíliga til sølu.
Tlf. 447361 ella 211168

VW PASSAT 1,9 TD ST. CAR
árg. 94, servo, el-sóltak, sentrallás, ABS, 2xairbag. Bilurin er hvítur og í sera góðum standi. Til sølu fyri 114.800 kr.
Tlf. 217566 & 217567

YNSKIST
Gearkassi til Toyota Camry, árg. 89. Model SV21.
Tlf. 448620. Fartlf. 214620

Amboð

DEKKAPPARAT!
El- og luftdrivið dekkapparat bíliga til sølu.
Tlf. 281895

FORSKALLINGSAMBOÐ
200 klams og ein spennibjørn, nakrar gevindstengur við møtrikkum, selist bíliga.
Tlf. 422145

LUFTKOMPRESSARI
Ein oljufríur luftkompressari, 250 l. til sølu.
Tlf. 442067

SLÁIMASKINA
Nibbi G 620, 3 gear, til sølu fyri 12.000 kr.
Tlf. 371352

SLÁIMASKINUR
Nakrar ístandsettar »Tielbürger« sláimaskinur til sølu. Eykalutir, søla og service.
Tlf. 284166

TEKKO FORSKALLINGAR
fáast í løtuni til sera góðir prísir. Frætti nærri hjá
Kaj Andreasen & Co.
Tlf. 315600

YNSKIST
Ein lítil hond grassláimaskina ynskist til keyps.
Tlf. 321807 ella 283640 eftir kl. 19

Arbeiði

ALT ARBEIÐI
við gravmaskinu verður gjørt, t.d. havar o.a.
Tlf. 217691

ARBEIÐI
Álítandi genta søkist at gera reint einaferð um vikuna uml. 4 tímar.
Tlf. 316328 eftir kl. 18

ARBEIÐI SØKIST
24 ára gomul genta søkir arbeiði í Havn, so sum at vaska ella passa børn. Eg eri von við børn.
Tlf. 221056 Beinta

ARBEIÐI SØKIST
Eg eri 15 1/2 ár, og kundi hugsa mær at sloppi við onkrum skipi/báti í míni summarfrítíð. Havi trygdarskeið.
Heini 317715-312917

ARBEIÐSMEGI
Søkt verður eftir tveimum monnum sum skjótast at inniloka eini sethús. Góð løn. Ringið og hoyrið nærri.
Heri Thomsen,
0045-40116852 - 319318

NORDPOL-VINDUESPOLERING
v/ Daniel Pedersen
Tilbud på vinduevask gives.
Tlf. 225042

REINGERÐINGSHJÁLP
Tilkomin, álítandi og húslig kvinna søkist til reingerðingsarbeiði nakrar tímar einaferð um ferð um vikuna.
Tlf. 316741

REINGERINGSHJÁLP
Er tað nakar sum hevur brúk fyri reingeringshjálp nakrar tímar um vikuna
ring 361435-321064

Barnaútgerð

BILBARNASTÓLUR
av merkinum Chicco upp til 10 kg, í góðum standi til sølu fyri 800 kr.
Tlf. 315246 Helena

BILSTÓLUR YNSKIST
Góður vælhildin brúktur bilstólur til bar, ið er uml. 1 ár. Allar støddir og prísir hava áhuga.
Tlf. 314624

BLÁUR
koyristólur við posa til sølu.
Tlf. 315640

BRIO BARNAVOGNUR
svartur leðurlook, væl viðfarin og í fínasta standi. Bara brúktur til eitt barn. Madrassa fylgir við.
Tlf. 319897

COMBIVOGNUR
til sølu fyri kr. 1.000,-
Tlf. 316022

GRØNUR
Silver Cross til sølu, við fiburmadrassu, regnslag, tasku og kurv, bert 1 ára gamal.
Ringið 319704

HOPPIGYNGA
ynskist til keyps.
Tlf. 444993

RIMASONG
í góðum standi til sølu.
Tlf. 448453

TIL SØLU
Ein gráur BRIO barnavognur við lyft til sølu fyri kr. 1.000
Tlf. 318697

TIL SØLU
Grønur BRIO koyristólur við posa og regnyvirtrekk. 2 paraply-klapvognar. Føroyskur skinnposi.
Tlf. 318814

TIL SØLU
Myrkagrønur »Silver Cross« barnavognur til sølu. Nýprísur kr. 4.800. Nú kr. 3.500.
Tlf. 332864 eftir kl. 18

VÆLHILDIN
Silvercross Charlton barnavognur við madrassu til sølu fyri 2.500 kr.
Tlf. 333377

YNSKIST
Bilstólur 9 til 18 kg til sølu.
Tlf. 449482

Lýsingartekstur

Lýsingin ynskist: 1 2 3 4 5 ferðir *(set X)*
undir teiginum:
❑ Akfør ❑ Amboð ❑ Arbeiði
❑ Barnaansing ❑ Barnaútgerð ❑ Bátaútgerð
❑ Bingo ❑ Brævaskifti ❑ Burturm./funnið
❑ Býli ❑ Bøkur ❑ Dansur
❑ Dýr ❑ Fundir ❑ Húsarhaldstól
❑ Innbúgv ❑ Lutaseðlar ❑ Leikur
❑ Matur ❑ Pløgg ❑ Samband
❑ Súklur ❑ Teldur ❑ Tónleikur
❑ Út- & sjónvarp ❑ Ymiskt ❑ .....

Lýsingarnar skulu vera okkum í hendi innan kl. 12.00. T.v.s. at lýsing til leygardagsblaðið skal vera okkum í hendi hósdag á middegi

Sent hevur:

Navn: .....

Bústaður: .....

Bygd/býur: .....

Tlf.: .....

»Lýsingartorgið«
Tíðindablaðið
Sosialurin
Box 76,
110 Tórshavn

Til frímerki

YNSKIST
Er tað nakar ið kann selja mær ein grulvigarð, ikki minni enn 100x100 cm.
Vinarliga ring 424790

YNSKIST
Danimic gittar til trappu ynskist til keyps sum skjótast.
Tlf. 316716

Barnaansing

DAGRØKTARMAMMA/ HEIMAGANGA
við børnum søkist til at ansa 2 ára gomlum drongi uml. 30 tímar um vikuna frá 1. aug.
Poula og Dávur
Tlf. 212489

Bátaútgerð

BÁTAMOTORUR
Ein 22 HK Sabb bátamotorur við aksilgreiðum til sølu fyri 8.000 kr.
Tlf. 370077

BJARGINGARÚTGERÐ
Vestar, kransar, rakettir, bluss sløkkiútgerð. - Tosið við okkum!
Kaj Andreasen & Co.
Tlf. 315600

TIL SØLU
4-mannafar við 10 HK páhangara til sølu.
Tlf. 441524

SPEEDBÁTUR
við vogni til sølu, 60 HK Mercery motorur. 1 teltvognur við fortelti 3.800 kr.
Tlf. 210072

TIL SØLU
Ein AWI 27 í góðum standi til sølu.
Tlf. 447242

Bingo

BINGO
verður í KFUK í Havn 10., 17. og 24. juli kl. 19. KFUK takkar fyri stuðulin.

STEVNUBINGO
Bingo verður í bygdarhúsinum í Vestmanna fríggjadagin 7. juli kl. 19.30. At vinna verður m.a. ein flogferð.
V.Í.F.

Brævaskifti

MAND/KVINDE
søges for brevveksling i alderen 50-60 ár fra Færøerne. Er kvinde, 56 ár, alene, 3 voksne barn. Er i fast job, egen lejlighed. Interesser i rejse, læse, frimrk. C og W, samt andet musik. Er dansk, men bosat i Norge. Håber på mange svar, gerne med foto. Svarer alle.
Merete Bahnson
Nåkkves vei 1-1-1057
N 0670 Oslo
Norge

Burturm. /funnið

BURTURMIST
Fóðraður brævbjálvi burturmistur í Miklagarði ella har á leið. Á honum stendur Svein Bjørn Weber. Í honum er ein snarbundin ljósagrá føroysk troyggja til barn ca. 1 ár.
Tlf. 313878

BURTURMIST Á JÓANSØKU
Eitt belti til føroysk klæði, mynstur opið blað. Helst mist á strekkinum bensinstøðin á Løghamri og út til tivoli. Hevur nakar funnið tað, vinarliga ring
Tlf. 447677

FOTOTÓL
funnið í haganum (gomlu plenu) í Vestmanna sunnudagin 2.7. Eigarin fær tað við at ringja á
tlf. 424770

FUNNIÐ
Kópaskinstaska funnin yviri við Strond.
Tlf. 351122

Býli

FERÐIST Í SANDOYNNI
Gisti á Mýruni í Húsavík. Vanligir hentleikar t.d. brúsa. Sera vakurt útsýni. Bilin til dyrnar.
Tlf. 318037

FERÐIST Í SUÐUROY
Vit hava eini sera hugnalig summarhús í Hvalba.
Tlf. 375097

FRÍTÍÐ Í MIKLADALI
Njótið friðaligt umhvørvi í Mikladali í frítíðarhúsum við øllum hentleikum.
Tlf. 455267 ella 456939

FULT MØBLERAÐ
íbúð á »Solbakken« miðskeiðis í Keypmannahavn til leigu frá 5. juli og ein mánaða fram. Kostnaður kr. 1.000 um vikuna.
Tlf. 33249305 (til 5. juli) eftir 5. juli tlf. 311612 ella 312076

HALLÓ TIT
Er tað nakar einsamallur m/k, sum vil deila eina góða stóra íbúð við mær, leiga ca. 1700 kr. um mánaðin, so skriva til:
bill.mrk. 443871

HALT FERIU Í RUNAVÍK
ella eitt vikuskifti, í góðari íbúð við øllum hentleikum, úti á Mýruni.
Tlf. 447451 best millum 18 og 19

HJÁLP!
Ungur friðarligur drongur søkir eftir kamar í Havn sum skjótast.
Tlf. 315318

HÚS Í RUNAVÍK
til sølu um hóskandi boð fæst.
Tlf. 448645 ella 220155

HÚS TIL LEIGU
Hús til leigu í Mogenstrup við Næstved frá 1.8.2000.
Tlf. 20287986
ella 23305005

HÚS YNSKIST
beinanveg ella ein íbúð, helst hús. Er okkurt at gera, taka vit eina hond við. Ringið um tit hava okkurt.
Tlf. 361435 ella 321064

HYGG HER
25 ára gamal maður søkir kamar í Havn skjótast tilber. Max. 1.500,- um mánaðin.
Tlf. 219005 Dan

ÍBÚÐ
søkist skjótast møguligt í Havn.
Vinarliga ring 457096

ÍBÚÐ MITT Í BÝNUM
Loftsíbúð til leigu frá 1. aug. til einsamallt fólk. Íbúðin er 60 kvm. og hevur gott útsýni.
Bill.mrk. 634868

ÍBÚÐ SØKIST
Mamma við 3 ára gamlari gentu søkir íbúð í Havn, Árgjum ella Hoyvík skjótast gjørligt. Alt hevur áhuga.
Tlf. 312615
t-postur:
missalda@yahoo.com

ÍBÚÐ SØKIST
Eg eri ein friðaligur ungur drongur, 22 ár og royki ikki. Um tygum hava eitt kamar at leiga mær í Havn, vinarliga ringið skjótast gjørligt tlf. 321712

ÍBÚÐ SØKIST
Ungur maður søkir íbúð ella stórt kamar í Havn skjótast gjørligt.
Vinarliga ring 214006
Pætur

ÍBÚÐ SØKIST Í KBH
Par við einum barni søkir íbúð í Keypmannahavn at leiga ella framleiga frá aug. mánaði.
Tlf. 316184

ÍBÚÐ YNSKIST
Ungt par søkir íbúð til leigu í Havn. Fara væl um.
Tlf. 315773

ÍBÚÐ YNSKIST
Sjómansskúlanæmingur ynskir íbúð til leigu í Havn fyri max. 3.000 kr. við ljósi og hita.
Tlf. 313463

ÍBÚÐ/KAMAR YNSKIST
Trúgvandi, friðarlig, 23 ára gomul genta leitar eftir lítlari íbúð/stórum kamari v/ atgongd til køk og bað í Tórshavn. Hevur fasta inntøku.
Tlf. arb. 314650
Tlf. 443252, e. kl. 17

ÍBÚÐARNEYÐ
Vit eru eitt par, ið hava brúk fyri eini íbúð í Tórshavn skjótast gjørligt. Vit hava bæði fast arbeiði, roykja ikki, fara væl um og gjalda til tíðina.
Tlf. 443226 ella 361134

KAMAR SØKIST
25 ára gamal (ungur) maður søkir kamar í Tórshavn skjótast tilber.
Ring tlf. 219005

KAMAR YNSKIST
Ung friðarlig genta søkir eftir kamari at leiga frá 7. aug., atgongd til baðirúm og møguliga køk, royki ikki, drekki ikki, tað skal vera í Klaksvík.
Ring á tlf. 456637

KAMAR YNSKIST
37 ára gamal maður ynskir kamar til leigu í Havn. Royki ikki, alt hevur áhuga.
Tlf. 281993

KAMAR YNSKIST Í 3 VIKUR
Ung friðarlig kvinna søkir kamar í 3 vikur, í sambandi við summarferiuarbeiði frá 23. juli. Fari væl um og royki og drekki ikki. Max 1.000 kr.
epost: mulandk@yahoo.dk

MAYDAY
Vit eru eitt ungt par, ið søkja eftir einari íbúð. Er tú ein sum veit um onkran útleigara ella kanska er útleigari sjálvur, so vinarliga ring til okkara á tlf. 361379. Tað skal sigast at vit fara væl um, og vit vildu helst at leigan lá um 3.500 v/ljósi og hita. Tó kann hetta altíð tosast um.
Spyr eftir Anitu

SUMMARFRÍ Í KEYPMANNAHAVN
3 ver. íbúð í Keypmannahavn (Amager) til leigu í viku 29-30-31. Íbúðin er 86 kvm. Hevur altan og er møblerað. Barnavinarligt umhvørvi.
Tlf. 32968190

SUMMARHÚS
í Skálavík til leigu, gott útsýni.
Tlf. 361217 eftir kl. 17

SUMMARHÚS Í HÚSAVÍK
til leig. Standa tætt við strondina. Útsýni yvir alla bygdina.
Tlf. 455565

SUMMARHÚS Í SUMBA
Lítil hugnalig summarhús við øllum vanligum hentleikum til leigu. Standa mitt í bygdini.
Tlf. 444097 ella 222026

HÚS TIL SØLU

Mál nr. 171
Adr.: Vágur
Stødd á húsum: 71,4 m²
Stødd á grundøki: 300 m²
Byggiár: 1955/56
Kostnaður: 300.000,- ella hægsta boð yvir

Mál nr. 172
Adr.: Langasandur
Stødd á húsum: Uml. 240 m²
Stødd á grundøki: 1000 m² + 1 trað 16000 m²
Byggiár: 1955
Kostnaður: 1.000.000,- ella hægsta boð yvir

Mál nr. 178
Adr.: Langasandur
Stødd á summarhúsi: Uml. 35 m² og úthús uml. 19 m²
Stødd á grundøki: Uml. 1200 m² og ein trað uml. 7000 m²
Byggiár: 1960
Kostnaður: Samlað kr. 400.000,- ella hægsta boð yvir (Kann seljast hvør sær)

Mál nr. 179
Adr.: Skálavík
Stødd á húsum: Uml. 116 m² við garagu í kjallara
Byggiár: uml. 1985
Kostnaður: kr. 450.000,- vegleiðandi prísur

Mál nr. 183
Adr.: Sandur
Stødd á húsum: 91 m² x 2 + loft (eisini fylgir eitt úthús við)
Stødd á grundøki: 2900 m²
Byggiár: 1972
Kostnaður: Kr. 400.000,- ella hægsta boð yvir

Mál nr. 184
Adr.: Signabøur
Stødd á húsum: 96 m² + loft
Stødd á grundøki: Uml. 705 m²
Byggiár: Uml. 1978
Kostnaður: Kr. 650.000,- ella hægsta boð yvir

Mál nr. 186
Adr.: Dalavegur 10, Tórshavn
Stødd á sethúsum: 10 x 16 alin x 2 og hjallur 4 x 6 alin
Stødd á grundøki: 231 m²
Byggiár: 1936
Kostnaður: Kr. 1.100.000,- ella hóskandi boð yvir

Mál nr. 187
Adr.: 440 Haldórsvík
Stødd á húsum: 61,25 m² + útbygning 19 m²
Stødd á grundøki: 500 m²
Byggiár: 1911 + útbygning 1992
Kostnaður Kr. 400.000,- ella hægsta boð yvir

Mál nr. 188
Adr.: 416 Signabø
Stødd á húsum: 76 m² x 2
Stødd á grundøki: 1335 m²
Byggiár: 1942
Kostnaður: kr. 950.000,- ella hægsta boð yvir

Ætla tygum at selja ella keypa hús, vilja vit fegin hjálpa tygum

GRUNDØKI og JØRÐ:

Mál nr. 609
Adr.: 440 Haldarsvík
Vídd á jørðini: 2 gyllin + innangarðs
Kostnaður: Kr. 60.000,- ella hægsta boð yvir

Mál nr. 531
Adr.: 430 Hvalvík
Vídd á grundøkinum: 763 m² (við ástandandi smáttu)
Kostnaður: Kr. 70.000,- ella hægsta boð yvir

Mál nr. 536
Adr.: 160 Argir
Vídd á ídnaðarøki: 706 m²
Kostnaður: Kr. 450.000,- ella hægsta boð yvir

Mál nr. 537
Adr.: 800 Tvøroyri
Vídd á jarðarøki: 2089 m²
Kostnaður: Kr. 100.000,- ella hægsta boð yvir

Mál nr. 538
Adr.: Sevmýri
Vídd á jarðarøki: 2972 m²
Kostnaður: Kr. 150.000 ella hægsta boð yvir

Mál nr. 539
Adr.: Í Líðini, Trongisvágur
Vídd á ídnaðarøki: 4171 m²
Kostnaður: Kr. 417.000,- ella hægsta

Húsamekling
Sp/f Protek, Vaglið, Postsmoga 331, 110 Tórshavn,
Tlf. 319321, Fax 319331, E-mail: protek@post.olivant.fo
Avgreiðsla kl. 9-12 og 13-16.
Keyp og søla av fastari ogn

SUMMARHÚS Í VÁGUM
ynskist í býti við apexferðaseðil frá 27/7 til 6/8
Tlf. heima 456344
arb. 457344

TIL GJÁAR AT FERÐAST
Eini eldri summarhús til leigu við Gjógv, við øllum vanligum hentleikum, so sum vaskimaskina og sjónvarp.
Tlf. 421305 ella 210305

TIL LEIGU
Møbelera 1-verilsis íbúð til leigu í Havn frá 15. juli. Kostnaður 3.500 um mðn. við hita. 2 mánaðar depositum.
Tlf. 312880

TIL LEIGU
Íbúð 67kvm til leigu í Havn fyri kr. 4.300 um mðn. við hita.
Bill. mrk. 100871

TIL SØLU
Hús á Sevmýru á Tvøroyri bíliga til sølu.
Tlf. 310591

TIL SØLU/LEIGU
Sethús á Sevmýri til sølu ella leigu.
Tlf. 371614

TIL SØLU
Eldri hús í Sørvági til sølu um hóskandi boð fæst. Grundøki 338 fermetrar.
Tlf. 333273
Att. Edith Jensen

TÓRSHAVN
Skulu tygum vitja í Tórshavn eitt vikuskifti ella nakrar dagar, er stórt gott kamar í miðbýnum við bað/wc og atgongd til køk, til leigu.
Tlf. 312205-288205

YNSKIST
Ung, friðarlig kvinna søkir kamar í 3 vikur í sambandi við summarferiuarbeiði frá 23. juli. Fer væl um, roykir og drekkur ikki. Max. 1.000 kr.
E-post:
mulandk@yahoo.dk

YNSKIST
Íbúð/kamar ynskist til ikki roykjara.
Tlf. 371563

Dansur

ÁRSINS DJ
í badmintonhøllini 22. juli.
Sí www.songrøddin.fo

MOONSHOT Á STRONDUM
Góður stevnudansur verður á Strondum leygarkvøldið, Moonshot spælir. Strálan og STÍF

Dýr

KANINUNGAR
4 sera fittir kaninungar fáast við at ringja.
Tlf. 313975

KETTLINGAR
4 kerligir, spæliglaðir kettlingar, sum eru vanir við børn og eru reinligir, latast djóravini. Allir hava tumlar.
Tlf. 319368 eftir kl. 18.30
Arb. tlf. 313322

KETTLINGAR
Sera fittir kettlingar av lodnum kettuslagi, (omman er persari), verða latnir djóravinum.
Tlf. 312891

KETTLINGAR
5 sera fittir, svartir kettlingar fáast við at koma eftir teimum. Eru lagdir 22. juni. Mamman er reinlig, fitt og sera kelin. Bert til kettuvinir.
Tlf. 444264